## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og eystri og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fleyr til gul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Rættarnevndin fekk psykiatarahjálp

Tá málið um broyting av revsilógini, soleiðis at tað skal gerast revsivert at gera mun á fólki vegna teirra kynsligu sannføring, var fyri í rættarnevndini, hevði nevndin sent boð eftir psykiataranum Tórmóði Stórá at hjálpa nevndini. Hetta stendur at lesa í gerðarbókini fyri fundin, ið varð hildin í gjár.

Tað skilst, at orsøkin til psykiatarahjálpina ikki er tann, at kjakið var so hart, at onkur hevði tørv á sálarligum stuðuli. Uppskotstillarin av lógarbroytingini Finnur Helmsdal sigur við Sosialin, at orsøkin til at psykiatarin varð innkallaður, var at onkur limur í nevndini metti, at nógvir ósvaraðir spurningar vóru havdir á lofti í kjakinum í Løgtinginum. T.d. um tað at vera samkyndum er viðføtt ella eitt val. Um samkynd veruliga verða happaði í føroyska samfelagnum o.a. Finnur sigur, at hann ikki heldur, at Tórmóður Stórá hevði serliga nógvar upplýsingar at veita nevndini, Tórmóður Stórá er vísindamaður og fer tí ikki at svara tílíkum, sigur Finnur Helmsdal.

**nud**

# Teir tríggir bestu í heiminum eru funnir

Fyrr í vikuni varð kunngjørt, at Ronaldinho var valdur at vera besti fótbóltsleikari í Evropa. Tá listin yvir teir tríggjar bestu leikararnar í heiminum, varð almannakunngjørdur í gjár, stóð navnið hjá Ronaldinho eisini á hesum listanum.

Tað eru ítróttarfjølmiðlafólk, ið hava valt Ronaldinho til besta leikara í Evropa, meðan tað í kappingini um at gerast heimsins besti leikari eru landliðsvenjarar og liðskiparar úr øllum FIFA limalondunum, ið hava atkvøtt.

Vinnarin verður almannakunngjørdur 19. desember, men í gjár vóru tey trý ovastu nøvnini almannakunngjørd. Teir tríggir á listanum eru Ronaldhinho og Samuel Eto'o úr FC Barcelona og Frank Lampard úr Chelsea FC. Frank Lampard gjørdis nummar tvey í kappingini um at gerast besti fótbóltsleikari í Evropa. Í fjør vann Ronaldinho virðislønina.

**nud**

# ALX í X-Size

Í sambandi við sína luttøku á Náttin er Ung fer rapparin ALX, at skriva autografir og práta við fjepparar í X-Size í Havn leygardagin frá kl. 13-15. Rapparin, ið gjørdist heimskendur í Føroyum, tá hann mest sum burtur úr ongum trein á pallin á fyrstu Náttin er Ung konsertini, og fekk alla ítróttarhøllina at kóka. Er eitt av høvuðsnøvnunum á tí rimmarstóra tiltakinum á Hálsi, ið Margarinfabrikkin skipar fyri.

**nud**

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | -2 |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 4 |
| Tromsø | -1 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | -3 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | -- |
| Paris | 0 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 19 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | -- |
| New York | 16 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | -- |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 982 hPa. við Hebridurnar fer spakuliga vestureftir. Hitabrúgvin til Føroya fer norðureftir.




**Í dag:**
Eitt djúpt lágtrýst við Cornwall fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum og hevur lýggja luft við sær.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/11 kl. 06⁰⁰– 1/12. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,6°
Minsti hiti máldur í nov.: - 7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,3 mm – mált frá 30/11 kl. 06$^{00}$– 1/12 kl. 06$^{00}$
Avfallið higartil í november: 167,0 mm

### Vika 47 – 27. nov.

1. Centrum:
**61 - 67 - 53 - 02 - 73 - 09 - 15 - 03 - 45 - 57 - 51 - 42 - 28 - 65 - 63 - 30**

1. Ramme:
**22 - 07 - 23 - 33 - 04 - 39 - 24 - 44 - 49 - 17 - 54 - 74 - 43 - 64 - 37 - 21 - 36 - 10 - 11 - 62**

Fuld plade:
**32 - 66 - 06 - 75 - 48 - 35 - 69**

Fri spil: **BO_E_**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **118.772,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **10.266,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **10.266,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **511,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **69,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

### TIPS 12 úrslit
**Vika 47– 27. nov.**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AaB - FC København | **2** |
| 2. | AGF - Silkeborg | **1** |
| 3. | Esbjerg - AC Horsens | **x** |
| 4. | FC Midtjylland - SønderjyskE | **x** |
| 5. | Viborg - FC Nordsjælland | **1** |
| 6. | Everton - Newcastle | **1** |
| 7. | Fulham - Bolton | **1** |
| 8. | Middlesbr. - West Bromw. | **x** |
| 9. | West Ham - Manchester U | **2** |
| 10. | Frankfurt - Stuttgart | **1** |
| 11. | Hertha Berlin - B.M'gladbach | **1** |
| 12. | Juventus - Treviso | **x** |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | **29.198,- kr.** |
| 11 røtt: | **2.460,- kr.** |
| 10 røtt: | **242 ,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

23. november Mánin longst frá jørðini
1. desember Tendring
5. desember Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. des | 05.49 | 18.15 | 04.49 | 17.15 | 05.04 | 17.30 | 07.49 | 20.15 | 08.49 | 21.15 | 04.04 | 16.30 | 03.04 | 15.30 | 06.04 | 18.30 | 07.04 | 19.30 | 05.34 | 18.00 | 06.49 | 19.15 |
| 2. Des | 06.43 | 19.11 | 05.43 | 18.11 | 05.58 | 18.26 | 08.43 | 21.11 | 09.43 | 22.11 | 04.58 | 17.26 | 03.58 | 16.26 | 06.58 | 19.26 | 07.58 | 20.26 | 06.28 | 18.56 | 07.43 | 20.11 |
| 3. Des | 07.39 | 20.08 | 06.39 | 19.08 | 06.54 | 19.23 | 09.39 | 22.08 | 10.39 | 23.08 | 05.54 | 18.23 | 04.54 | 17.23 | 07.54 | 20.23 | 08.54 | 21.23 | 07.24 | 19.53 | 08.39 | 21.08 |
| 4. Des | 08.36 | 21.04 | 07.36 | 20.04 | 07.51 | 20.19 | 10.36 | 23.04 | 11.36 | - | 06.51 | 19.19 | 05.51 | 18.19 | 08.51 | 21.19 | 09.51 | 22.19 | 08.21 | 20.49 | 09.36 | 22.04 |
| 5. Des | 09.32 | 21.58 | 08.32 | 20.58 | 08.47 | 21.13 | 11.32 | 23.58 | 00.04 | 12.32 | 07.47 | 20.13 | 06.47 | 19.13 | 09.47 | 22.13 | 10.47 | 23.13 | 09.17 | 21.43 | 10.32 | 22.58 |

5 707265 100050 >